

NÝTT HÚS

*Soleiðis fer nýggja húsið at síggja út*

# Eitt prýði fyri býin

**BYGGING** Havnar Abeiðsmannafelag fer nú at byggja nýggjan stóran bygning á Tinghúsvegnum. Húsið verður prýði fyri býn og ein stoltleiki hjá arbeiðsmanninum, sigur Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag

Randi Jacobsen

Stóra húsið hjá Havnar Arbeiðsmannafelag á Tinghúsvegnum við endaveggi út móti Bøkjarabrekku er ikki júst stásiligt. Tað

Er í sera ringum standi, men heldur at brúka nógvan pening upp á at umvæla húsið valdi Havnar Arbeiðsmannafelag at byggja nýtt.

Hetta er húsið, har Faroe Dane áður húsaðist.

Ætlanin er so skjótt sum gjørligt at ara undir at taka gamla húsið niður, og tilboðini uppá at byggja nýggja húsið skulu væntandi koma inn um mánaðrskiftið mai-juni.

Tað fer at taka eitt gott ár at byggja nýggja húsið.

- Vit hava lagt dent á, at tað nýggja skal vera eitt vakurt hús, eitt prýði fyri býin og eisini ein stoltleiki fyri arbeiðsmannin, sigur Hans Joensen.

### Fimm hæddir

Teknistovan Magnus hevur teknað húsið, sum fer at hava gólvvíddina 1414 fermetrar samanlagt. Húsið verður í fimm hæddum, harav niðasta hædd verður parkeringskjallari.

Hæddina inn fyri vegnum skal Havnar Arbeiðsmannafelag hava til sítt egna virksemi, og hinar hæddirnar verða innrættaðar sum skrivstovur at leiga út.

Magnus Hansen sigur, at framsíðan á húsinum verður í glasi, sum verða gjøgnumskygd. Konstruksjonin verður úr stáli.

- Eg havi roynt at fáa nýggja bygningin samansjóðaðan við tað gamla beint við, men hesin bygningurin verður léttari, sigur Magnus Hansen.

Hetta verður ein nýmótans bygningur í miðbýnum, og hann fer at verða við til at styrkja miðbýnin sum miðbý, sigur Magnus Hansen.

Tað er stórarbeiði at fyrireika byggingina av einum slíkum húsi, og Teknistovan Magnus fekk UP-verkfrøði at gera sín part, og Viggo Akraberg Hansen hevur fyrireikað el-arbeiðið.

# Ferðsyndari fangaði fullan bilførara

Randi Jacobsen

Fríggjadagin koyrdi ein bilur út frá Magn-støðini í Klaksvík og rendi inn í ein annan bil.

Bilførarin breyt víkiskylduna men gjørdi samstundis eina góða gerð.

Tað vísti seg, at bilførarin í árenda bilinum var dýrandi fullur. Hann sleppur at svíða fyri, at hann koyrdi ávirkaður.

Hóast sína góðu gerð fær hin bilførarin eisini eina heilsan fyri brotið á ferðslulógina.

# Skuldsettur fyri harðskap

**Ein fullur maður legði seinnapartin fríggjadagin á umsjónarmannin í almenna vesinum í Mylnugøtu í Havn**

Tað kann vera nokktso útsett arbeiði at ansa eftir við eitt alment vesi, har fólk, sum mala í býnum koma inn.

Fríggjadagin var umsjónarmaðurin í almenna vesinum í Mylnugøtu í Havn fyri eini keðiligari uppliving.

Nakrir fullir menn komu inn, og ein teirra slerdi umsjónarmannin í høvdið. Umsjónarmaðurin fór á Landssjúkrahúsið til kanningar við smærri snuddum.

Tann fulli maðurin varð skuldsettur fyri harðskap.




*Øll eru ikki hampa fólk, sum vitja í vesinum í Mylnugøtu. Fríggjadagin var umsjónarmaðurin álopin, tí hann vildi ikki loyva fullum vitjandi at koma inn við øli*